**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Køksatstøðingur - endurlýsing

Í køkinum á Landssjúkrahúsinum er eitt fulltíðar fast starv leyst at søkja til setan skjótast gjørligt.

**Vit søkja starvsfólk við:**
- útbúgving sum køksatstøðingur ella líknandi útbúgving
- áhuga og fleksibilitetið í mun til uppgávurnar
- fakligum dugnaskapi
- samstarvsvilja
- sjálvstøðugleika
- ábyrgdarkenslu

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt spennandi og avbjóðandi arbeiði
- eitt arbeiðspláss í menning
- eitt arbeiði við góðum og dugnaligum starvsfeløgum

**Løn og setanartreytir** smb. sáttmálan millum Økonomafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið.

**Nærri fæst at vita** um starvið við at venda sær til Gudnu á Rógvi Joensen, telefon 30 45 00, lokal 1260, teldupostur gurojo@lsh.fo

**Umsóknarfreistin er** tann 3. juli 2006 kl. 12.00.
*Tað er umsøkjarans ábyrgd, at umsóknin er á Lønar- og starvsfólkadeildini áðrenn freistin er úti.*

**Skrivligar umsóknir** við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og Starvsfólkadeildin
FO-100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna "starvsfólk"*

# Kom og arbeið hjá okkum!

**Vit eru 8 fryntligir og ágrýtnir pedagogar sum saman við okkara dugnaligu hjálparfólkum mangla starvsfelagar.**

Vit hava brúk fyri 2 pedagogum, hjálparfólki og avloysarum at byrja 7. august 2006.

2 pedagogar 30 - 40 tímar í eina stovu við 6 ára gomlum børnum, stjørnuskot.

Tú fært eitt spennandi og avbjóðandi starv, sum inniber at uppbyggja og gera dagin hjá børnunum innihaldsríkan, mennandi og avbjóðandi tað síðsta ári áðrenn barnið fer í skúla.

1 hjálparfólki 20 tímar í barnagarðsstovu við 12 børnum, grøna hús.

1 hjálparfólki 15 – 25 tímar í barnagarð við 15 børnum, stjørnuskot.

1 fólk til køkin 25 tímar viku.

2 avloysarar at ringja til tá vit mangla fólk.

**Um stovnin:**
Vit eru ein sjálvsognarstovnur, í løtuni normeraði til 75 børn, 20 vøggustovubørn og 55 barnagarðsbørn. Vit hava 3 barnagarðsstovur, 1 stovu við 6 ára gomlum børnum og 2 vøggustovur. Stovnurin er býttur upp í 3 hús, 1 barnagarðs - og vøggustova í tveimum húsum og 1 barnagarðsstova og 1 stova við 6 ára gomlum børnum í einum húsi.

Uttanfyri er ein góður garður, sum er mennandi fyri børnini og góður at spæla í.

**Løn:**
Lønin er sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag.
Freistin at søkja er 26. juni kl. 12.00.

Eru spurningar um arbeiðini, ring til Onnu Mariu tlf. 317319 ella 317452, lokal 10, ella 217318.

Umsóknir skulu sendast til :

**Dagstovnin í Hoyvík**
Vegurin Langi
188 Hoyvík
Viðmerkjast »umsókn«

# Runavíkar kommuna søkir eftir

# pedagogum til Barnagarðin á Mýrunum

Í Barnagarðinum á Mýrunum ganga 94 børn. Á stovninum eru 2 vøggustovur við 14 børnum í hvørjari, 2 barnagarðsstovur við 20 børnum í hvørjari, 1 barnagarðsstova við 6-ára gomlum børnum og 1 stova ætlað børnum við serligum tørvi.

Umstøðurnar á stovninum eru sera góðar við ljósum rúmligum stovum við eyka spælirúmi. Harumframt er verkstaður, sansirúm, samtalu/venjingarrúm og stórt felagsrúm við barnavinarligum køki. Stovnurin liggur í vøkrum náttúrulendi beint við Toftavatn og nær við ítróttarøkið

Endamál stovnsins er, við støði í tí einstaka barninum at geva tí møguleika at mennast, bæði persónliga og saman við øðrum. Fyri at røkka málinum er neyðugt við einum tryggum og stimbrandi umhvørvi, við góðum samstarvi millum leiðslu, starvsfólk og foreldur.

**Vit ynskja tí at umsøkjarin:**
- hevur umsorgan fyri børnum
- hevur góð samstarvsevni
- er íðin, nærlagdur og álítandi
- hevur gott yvirlit og megnar at skipa dagin
- er nýhugsandi og ígongdsetandi

**Søkt verður eftir:**
- 3 pedagogum 30 t. um vikuna
- 1 pedagogi 35 t. um vikuna

Setan verður frá 14. aug. 2006 ella eftir nærri avtalu.

Um eingin pedagogur søkir størvini, verða hjálparfólk sett ístaðin.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um størvini við at tosa við Eyðnu Norðfoss leiðara á tlf. 448254 ella 218254

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi týsdagin 20. juni. 2006, kl. 12,00.

**Runavíkar Kommuna**
Sosiala deild
Heiðavegur 26
FO-600 Saltangará

# Hevur nakar funnið meg???



Eg eri ein sera fittur kettlingur. Eg fór út mánakvøldið, men eg fann ikki heim aftur. Tey sum eiga meg leingjast forbiðið nógv eftir mær. Eg eri ikki í nøkrum hálsbandið.

Um tú hevur sæð meg, kanst tú ringja til Helenu Egholm á 509717. Eg viiiiiil sleppa heim.

**Tlf. 509717**


**KAPPRÍÐING VIÐ LEYNAVATN**



Kappríðing verður leygardagin 17. juni kl. 15.00

Tilmelding seinast mikudagin 14. juni kl. 19.00
Ring: 219098 · 224343 · 213666 · 222222

**FØROYA RÍÐINGARFELAG**



FAROE DIVE.fo **Kavaraskúli**

